# Lómur farin í sigling

## Nýggjasta farmaskipið í flotanum kostar 29 milliónir krónur

**FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI**
*Eirikur Lindenskov*

Tann 29. apríl í 1978 skrivar Sosialurin um tað fyrra av nýggju farmaskipunum hjá Skipafelagnum Føroyar, Lóm, sum er farið í sigling millum Føroyar og Danmark. Sosialurin skrivar:

»Hann kom til Føroya fyrrapartin týsdagin (tað er flaggdagin í 1978), og hevur síðani verið framsýningarferð kring oyggjarnar, til hann í gjárkvøldið ella tíðliga í morgun skuldi fara til Danmarkar á fyrsta túrin.

Samstundis sum Lómur er settur í siglingina, verður norska farmaskipið Vela, sum Skipafelagið hevur leigað, síðani gamli Lómur varð seldur, latin norsku eigarunum aftur.

### Sama slag sum Vera

Lómur er bygdur á sama hátt sum Vela, men er nakað størri. Tað eru norðmenn, sum hava útviklað hesa serlgu skipatypuna.

Lómur er 77 metrar langur, 14,5 metrar breiður og 9,40 metrar djúpur, máludr av shelterdekkinum. Ferðin er um 14 míl.

Hann er merktur 1460 tons deyðvekt, lastarúmið er 172.000 kubikføtur, og hann hevur frystirúm upp á 20.000 kubikføtur. Frystirúmið er býtt sundur í fýra líka stór rúm, sum kunnu hava ein hita upp á millum +30 og - 30 stig.

Skipið hevur tvey síðuportur í bakborðssíðu.

Tað størra portrið verður lagt niður á bryggjuna, soleiðis at truckar og bilar kunnu kjoyra beinleiðis umborð. Hitt síðuportrið er har frammi, og gongur inn á millum dekkið.

Innan fyri tað størra portrið eru tveir elevator, sum tilsamans kunnu lufta upp til 8 tons. Teir verða brúktir til at flyta góðsið niður á hini bæði dekkini. Tað er pláss fyri 34 20 fóts kontainarum í lastini , um framt 6 20 fóts frystikontainarum.

Hæddin á dekkinum er 2,70 metrar, og hetta er ein stórur fyrimunur. Góðsið fær eina betri viðferð, tí tað er ikki neyðugt at stápla góðsið ov nógv oman á hvørt annað.

### Hitt skipið lastast í desember

Manningartalið á Lómi verður 12, og skipari er John Hansen, sum er ættaður av Toftum. Tað eru 27 koyggjupláss, harav tey 12 eru roknað til ferðafólk.

Samlaði byggikostnaðurin er 29 milliónir krónur. Sáttmálin er gjørdur í norskum krónum, og Skipafelagið hevur spart eini 6% við tað, at norska krónan varð nðurskrivað við 8% fyrr í ár, meðan tann danska kronan ikki varð niðurskrivað.

Tað er Frosen Verft í Rissa, norðan fyri Tróndheim, sum hevur bygt Lóm. Sama skipasmiðja skal byggja eitt skip av sama slag til Skipafelagið. Byrjað er upp á byggingina, og skipið skal latast Skipafelagnum í desember mánaði í ár.«



*Rósing Rasmussen, stjóri í Traderline, var eisini við á framsýningarferðini týsdagin. Hann sæst her saman við Oddi Niclasen, stjóra í Skipafelagnum Føroyar*



*… og skipasýnið var eisini umboðað*

## EG MEINI TAÐ

### Bjargið Kondittarínum!



*Elin Heinesen skrivar:*
www.heinesen.fo

Í vikuni fekk eg eitt teldubræv við omanfyrinevndu yvirkrift, har heitt var á meg at skriva undir uppá, at Kondittaríið eigur at varðveitast og latast upp aftur sum Kondittarí. Áheitanin verður seinni latin eigaranum, Býráðnum, Miðbýarfelagnum og bløðunum. Fyrst hugsaði eg: ein sera sympatiskur tanki, men nyttar hetta nakað? Er - ella var - Kondittaríið ikki ein undirskotsforrætning? Kann ein so krevja av eigaranum at lata Kondittaríið uppaftur? Men minnini og nostalgiin komu eisini á meg.

Síðani eg var umleið 14 ára gomul, hevur Kondittaríið verið eitt fast - og eisini best dámda - tilhaldsstaðið hjá mær í Havnini. Hóast vitjanirnar tey seinastu árini ikki hava verið eins nógvar og fyrr, tí eg næstan bara havi verið í Føroyum um summarið, hevur mynstrið verið tað sama: hvørja ferð eg var í býnum, mátti eg - sum so mangur annar - leggja leiðina inn á Kondittaríið at vita, um ikki onkur, eg kendi, sat inni har. Og aloftast var tað so, at onkur var at skifta orð við. Tær, sum serveraðu - Hanna, Randi, Heinina, Frida, Merry og allar hinar góðu, gomlu serveringsdámurnar vóru so altíð har at tosa við.

Í fyrstani, tá eg bara var tannáringur, var Kondittaríið eitt stak spennandi og eitt sindur forkunnugt stað at fara inn og spæla eitt sindur vaksin saman við teim vaksnu. Har sótu tey, sum myndaðu Havnina, og vit hugdu og lurtaðu og sugu av fortíðini. Men seinni, tá fleiri og fleiri javnaldrar eisini stukku inn á gólvið, ognaðu vit okkum Kondittaríið sum okkara hugnastað eisini, og so við og við gjørdust vit eisini havnarmyndir, sum tey ungu hugdu at og lurtaðu eftir við forvitni. Fasta klientellið á Kondittarínum kendist sum ein partur av familjuni. Hvørja ferð eg kom inn, spurdu tær, sum serveraðu, við áhuga, hvussu gekst, og tær hava fylgt við í lívi mínum heilt fram til dagin í dag. Og soleiðis gjørdu tær Konditta-ríið til eitt so heimligt stað at koma inn.

Á Kondittarínum flutu samrøðurnar millum gestirnar lætt. Ofta sat onkur, eg kendi, saman við onkrum øðrum, eg ikki kendi, og so var lagamanni at læra eisini hetta fólkið at kenna. Og mangt var at práta um. Altíð okkurt á skránni, altíð okkurt at hava eina meining um - politikk og annað, sum nú var á vási. Men tað var ikki neyðugt altíð at práta í eyst og vest. Kanska tú fórt inn bara fyri at sita í einingi og lesa bløðini. Ella tú fórt við einari vinkonu inn at sita í einum horni onkustaðni at práta so spakuliga um intimar fortreðiligheitir, tú nú hevði við manni, børnum ella øðrum, sum eingin uttan vinkonan mátti hoyra um. Ella tú fórt inn við dóttrini at hvíla beinini aftaná ein longri innkeypstúr at njóta ein deiligan temunn afturvið einum franskbreyðsbita við rullupylsu ella øðrum. Ella tú fórt inn við útlendskum gestum at vísa teimum hetta serføroyska stað, sum ikki kennir sín líka í heiminum og tey nikkaðu og søgdu seg væl skilja, at hetta staðið var so væl umtókt. Ella tú fórt inn at halda ein óformellan arbeiðsfund við onkran, osfr.

Alt bar so væl til á Konditta-rínum, tí her var hugnin, tann rætti friðsæli dámurin og ikki tann harði tónleikurin, sum ofta dominerar so manga aðra staðni, har sterkari løgur verður seldur og ein næstan má rópa fyri at hoyra hvør annan. Onnur meira nýmótans støð eru komin, sum á sín hátt klæða Havnini, tí ein nýggjari pulsur skal eisini til í einum metropoli, men Konditta-ríið var Kondittaríið, tann tryggi grundsteinurin, sum ikki broyttist. Tráðurin aftureftir, sum setti restina í relieff. Eg dugi ikki við, at hesin tráðurin nú er kvettur! At eg ikki kann fara inn á Kondittaríið, nalvan í Havnini - tá eg komi heim aftur í summar at tryggja mær, at Havnin enn er staðið, eg innast inni hoyri heima, tí her traðkaði eg barnaskógvarnar og vaks upp saman við øllum hinum havnarfólkunum.

Tað er, sum um einki annað kann setast ístaðin, sum gevur mær tað sama, sum Kondittaríið gjørdi Eg sigi ikki, at tað gamla pr. definitión altíð er vert at varðveita, bara tí tað nú einaferð altíð hevur verið har. Tað er neyðugt við eini ávísari endurnýggjan í einum samfelag alla tíðina og okkurt má fella, ið ikki kann standa. Hinvegin er tað heldur ikki so, at alt tað nýggja pr. definitión altíð er betri enn tað gamla. Okkurt millumting má vera onkustaðni. Havnarmentanin hevur eitt stað sum Kondittaríið fyri neyðini, tí Kondittaríið var fram um alt staðið har fortíð og nútið, ung og gomul, møttust og bundust saman.

Eg vóni inniliga, at til ber at finna onkra loysn, so Kondittaríið kann stuðlast og lata upp aftur - og enn vera tann nalvin Havnarfólkið saknar. Tí skrivaði eg undir áheitanina, og heiti á onnur um at gera tað sama!

**Vikuskifti**

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



# Burturmista parlamentið

**HUGLEIÐINGAR**
*Ása undir Kletti*
*auk@post.olivant.fo*



Eg havi verið ein vikuskiftistúr í Skotlandi, sum er mítt yndisferðaland. Vit vóru 6 konur, sum fyri tíð síðani stungu út í kortið at fara ein túr til Aberdeen. Sjálvandi høvdu vit "lisið uppá", áðrenn vit fóru, og var mítt uppskot, at vit skuldu fara og vitja skotska parlamentið í Edinburgh, sum bert hevur nøkur fá ár á baki. Hvør minnist ikki Sean Connery í eyðkenda skotska búnanum við kiltinum sveiggjandi um maskulinu og sexutu knøini, tá parlamentið varð sett tann 1. juli 1999. Nú komi eg sum ketta úr høvdatrog, men eg haldi, at her er so avgjørt vert at skoyta uppí, at skal kilturin seymast á rættan hátt, fara uml. 6 metrar av ullintum fyrsta floks tilfari í skjúrtið, so her er eingin vandi fyri at gerast kaldur hvørki so ella so!

Ná. Eg hevði sum eg nevndi verið inni á heimasíðuni http://www.scottish.parliament.uk/ bæði tíðliga og síðla, so mítt mentanarískoyti til ferðina var ílagi. Hevði enntá ætlanir um, at vit skuldu fara at vitja eitt Chamber og ordiliga dusa okkum saman við skotsku tingkonunum/-monnunum. Vert er at nevna, at alt tilfarið á heimasíðuni eisini finst á geliskum máli, men eg skundi mær at viðganga, at eg lætt og elegant leyp tað um. Tað var sum at lesa swahili, og tað havi eg ongantíð lært. Hinvegin, so skuldi ein mestsum trúð, at tað var har, eg hevði lisið uppá.

Vit høvdu sett ein heilan dag av til at verða "mentaðar" í Edinburgh, so vit rættiliga kundu njóta og náa at vitja ymiskt hugfarsligt á Royal Mile, sum er gøtan millum Edinburgh Castle og Holyrood Palace, áðrenn vit so at siga rundaðu mentanartreffið av við vitjanini í skotska tinginum.

Stuttligt at standa í kø ymsastaðni í Skotlandi. Serliga uttanfyri inngongdina til borgina, tí "kioskirnar", har atgongumerkini vórðu seld, mintu allarmest um pylsuvognarnar hjá Gøl, so eg mundi biðið um eina stokta við øllum, tá eg slapp framat. Og so skuldi tú næstan vera tveir metrar høg, skuldi tú røkka upp at tosa við fryntligu konuna aftanfyri lúkuna og siga tíni ørindi. Hugsaði eina løtu, at smílandi kinesararnir, sum sóust í hópatali, mestur høvdu leigað sær eitt eykaflogfar til skammlar, tá teir bíløgdu ferðina til Skotlands. Sjarmerandi hóast alt.

Vit byrjaðu, sum vera man, við Edinburgh Castle, og var borgin væl og virðiliga kannað og hvørt skot vitjað. Onkuntíð snýtti eg eitt sindur og setti meg at sóla mær á einum beinki á "torginum" saman við ymsum øðrum fólkasløgum, meðan "mínar konur" stukku innum í elligomul skot og krókar at hyggja at ymsum áhugaverdum.

Hugfarsligt at eygleiða tað, sum fyrifórst. Sá hópin av fólki, sum gingu aftur og fram, og blundaði eg, var tað sum at sita á beinkinum við Stephanssons hús á Ólavsøku. Eitt hugnaligt suð við tutli og mutli, pjátri og práti.

Havi lisið á netinum, at umleið ein millión vitja borgina árliga, so tað má sigast at vera praktiskt og skilagott, at øll ikki vitja ísenn! Pylsuvogna-atgongumerkið kostar 8 pund, so har er eitt sindur at gera sær dælt av. Gott hjá skotunum.

Nú var tíð at hugsa um at ganga oman eftir Royal Mile. Nógvar freistingar eru á vegnum - handlar við alskyns serskotskum vørum. Ikki vardi leingi, fyrrenn onkrar konur vóru "vanished from the face of the earth". Løtu seinni komu tær undan kavi aftur, og so PUFF vóru tær burturi aftur. Hetta var næstan sum at hyggja at Road Runner í Cartoon Network. Mestur var okkurt plaggið í taskuni, tá av tornaði.

Nú var løtan komin, har eg skuldi vegleiða og leiða okkum allar inn í játtaða staðið — skotska tingið. Tað var ikki sørt, at eg var eitt sindur errin, tí eg hevði gjørt mær stóran ómak við undankanningum á netinum, so einki skuldi taka okkum á bóli. Komnar heilt oman ímóti Holyrood Palace var stórt skelti, sum við grønum stavum segði "Scottish Parliament". "Her var tað," segði ein í bólkinum, hon kendi staðið aftur. Og so fóru vit til gongu. Og so gingu vit og gingu vit framvið einum stakitti runt og runt, men einki ting vit funnu. Kom at hugsa um Jerikos múrar. Men her hjálpti eingin gásagongd við fittum, føroyskum, forharmaðum, fyriløgstum, forvitnum frúum. Ikki so mikið sum ein sprunga var at síggja í verjuni.

Til endans fór eg lúkst inn í ein arbeiðsskúr og spurdi, um vit vóru á beinari kós. Fryntligi arbeiðsformaðurin hugdi við eitt sindur av sorgblídni at mær og segði, at vit skuldu fylgja stakittinum runt aftur og so fara beint yvirum aftur, haðani vit vóru komnar. So gingu vit longur fram og aftur, runt og runt og so beint yvirum aftur. Nú var eg heldur ørkymlað.

Hevði sæð myndir av tinginum, kendi onkran eyðkendan part aftur, men hetta var eitt veldugt byggipláss, alt sum tað var. Minti ikki sørt um Bursatanga, sum hann hevur sæð út í seinastuni.

Spurdi eisini onkran "lokalan", og var onkur teirra millum, sum ikki visti, at tey høvdu eitt parlament yvirhøvur! Løgið. Nú vóru vit við at geva skarvin yvir. Vóru vit ikki púra í ørviti, blivu vit tað við vissu, tá vit knappliga sóu ein handil, sum spældi "Jingle Bells", so tað hoyrdist langa leið, og sum hevði gluggan fullan av jólapynti. Í mars!

Nú høvdu vit gingið og gingið, so sveittin lak av okkum. Var tað so spinnandi galið, at einki parlament var? Hvat so við Sean Connery og sexutu knøunum? Vit hugdu at hvørjari aðrari. Við drýpandi høvur máttu vit viðganga, at vit høvdu mist parlamentið burtur. Soleiðis var tað.

Komnar nakað niðan ímóti Royal Mile sóu vit eitt, sum nevndist "Scottish Parliament - Visitor's Center". Hurrá. Endiliga. Nú vóru vit har. Men gakk! Her var einki parlament. Bert ein kunningarstova. Komnar innum, greiddi ein fryntligur skoti okkum frá, at broytingar og seinkingar høvdu við sær, at parlamentið ikki fór at verða liðugt fyrrenn í 2004! Men vit vóru vælkomnar at síggja ein film um upprunan til nýggja tingið. Vit mestsum sukku niður á sjáldsomu sofurnar, sum mintu mest um jollukjølar, andaðu djúpan, hugdu uppá hvørja aðra og so flentu vit, so tárini duttu niður eftir kjálkunum. Ikki vóru nógv fólk og vitjaðu beint tá, men konan aftan fyri handilsdiskin, har tey seldu krúss o.a., sá út sum um hon hevði bestan hugin at ringja eftir trygdarvørðinum. Tað var uttan iva ein stuttlig/ræðandi sjón - seks troyttar, føroyskar konur í skellilátri, hálvavegna liggjandi og sitandi á" kjølunum" frammanfyri stórskíggjan, har sinniligi spanski arkitekturin við síni floyalsmjúku, djúpu rødd royndi sítt ítarsta at greiða frá grundhugsjónini aftan fyri nýggja bygningin, har júst kjølurin hjá "the dinghy", eyðkendu skotsku jolluni, hevur ein stóran leiklut.



Og vit? Jú. Vit komu fyri okkum aftur eftir einari løtu. Tá ein okkara hevði handað fryntliga skotanum teppið aftur, sum hon slapp at leggja undir troyttu føturnar, takkaðu vit honum so miriliga fyri, keyptu okkum hvør sítt tinganest frá kløkku skotsku handilskonuni og funnu okkum síðani eina rætta kafé, har vit skolaðu burturmista parlamentið niður við einum góðum kaffimunni. Og ikki var sørt, at vit kendu okkum rættiliga parlamentaðar eina løtu.

Kanska fara vit avstað aftur at leita í 2004. Hvør veit.

